Tíðindabrævið
Hugin & Munin
Granskingarverkætlanin fyri Økismenning
Nr. 4 januar 2001 1. árg.

# Båtsfjord: Samstarv millum kappingarneytar


*Aftast á myndiní sæst framkomna fyritøkan Miljøprosess, fremst er hotellið í Båtsfjørðinum.*

Í norska býnum Båtsfjord – ið liggur so norðarlaga, at hann ber heitið 'Portrið til Íshavið' – búgva einans umleið 2500 fólk. Ókunnufólki fellur tí valla inn, at hettar er ein rættiliga framkomin býur.

Båtsfjord liggur nær stórum fiskiríkidømi, men í aðrar mátar fjart frá resursum, ið vanliga eru tengdar at búskaparligari menning í nýtíðarsamfelagnum. Hvat gerst so fyri at yvirliva sum lokalsamfelag?

- Svarið er 'samstarv millum kappingarneytar', sigur Bartal Dulavík, ið sjálvur hevur starvast drúgva tíð í Båtsfjørðinum.

Í býnum eru nakrir høvuðspersónar innan vinnuna, ið sum fremsta endamál hava at forvinna pening burturúr teirra virksemi á staðnum. Teir eru partvís í kapping sínamillum, men teimum er greitt, at ein fortreyt fyri framhaldandi menning er, at teir samstarva á summum økjum.

Og so gera teir tað! Tað avgerandi er, at stórt sæð alt, sum fyritøkunum tørvar av vørum og tænastum, skal kunna útvegast í býnum sjálvum.

Samstarvið sæst aftur í eini røð av stovnum og fyritøkum, sum eru felagstiltøk. Allar fyritøkur, ið eru knýttar at fiskivinnuni, eru í einum bólki, og javnan møtast leiðarar og millumleiðarar til morgunmatar fyri at tosa um ítøkilig mál. Í øllum førum, har fyrimunir eru við at fara út sum ein fyritøka, verður tað gjørt, t.d. í sambandi við tryggingartilboð, lánsrentur, keyp av streymi.

Eisini eru fleiri vinnuligar fyritøkur ella resursir, sum Båtsfjord-fyritøkur eiga í felag. Millum hesi eru Miljøprosess, ið ger mjøl, proteinkonsentrat og olju burturúr uggum, ryggjum og skræðu; 12 fólk starvast á virkinum, ið hevur ein umsetning uppá 15 mill. kr.

Aarnes er eitt virkið, ið fleiri fyritøkur eiga í felag; tað keypir lodnu og frystir hana til marknað, og harumframt virkar virki eisini sum laksasláturvirki, og arbeitt verður fram ímóti at gera fóður til ymisk fiskasløg. Ein onnur felagsfyritøka er alibrúkið Aquapolar. Ein stór frystigoymsla er eisini í Båtsfjørðinum, sum fleiri virki eiga í felag. Fiskeriindustriens Teknologi Institutt A/S er ein framkomin fyritøka, ið vinnan eigur og sum eftir bílegging ger tøkniligar loysnir til vinnuna.

Fiskivinnufyritøkurnar hava eisini stovnað Fishnet AS, ið hevur til endamáls at menna samstarvsformar í vinnuni, herundir at gera felags KT-loysnir. Eitt nú hevur Fishnet A/S bundið fyritøkurnar saman í eina intranet- og e-postskipan, stendur fyri felags KT-viðlíkahaldi, felags alarmsskipan, felags innkeypsrutinum og hevur eisini gjørt eina goymsluskipan, ið allar fyritøkurnar brúka.

Ein fiskivinnubýur hevur sum vera man brúk fyri einum laboratorium, og so hava båtsfirðingar tikið stig til tess: Båtsfjord Laboratorium A/S eitur fyritøkan, og eigararnir eru fiskavirkini í býnum og kommunan. Har verða allar neyðugar royndir tiknar fyri vinnulívið og myndugleikar (t.d. vatn) ímóti gjaldi, eisini fyri aðrar bygdir; eisini verða starvsfólk leigað út, er eftirspurningur eftir tí.

Stórur partur av arbeiðsmegini í Båtsfjørðinum kemur og fer, eisini útlendingar, og 'gjøgnumtrekkurin' skapar fyri ein part sosialar trupulleikar. Tí verður dentur lagdur á at skapa trivnað og útbúgva arbeiðsmegi við nøktandi førleika. Ein týðandi stovnur í hesum høpi er Båtsfjord Utviklingsselskap A/S, ið skipar fyri undirvísing í øllum frá trukkkoyrikorti yvir fiskivinnuútbúgving til skeið á universitetsstøði. Eigarar: Vinnulív og kommuna. BOAS samstarvar við universitetið í Tromsø, ið heldur skeið í Båtsfjørðinum, ið verða goldin av vinnuni og kommununi í felag.

Í samband við fiskivinnuskeiðini er avtalað, at eitt av virkjunum einsamalt tekur sær av praktikkini og fær samsýning fyri tað. Harumframt er eitt væl skipað samstarv millum skúlan og vinnulívið.

Størstu av fyritøkunum hava eigarar uttaneftir, men leiðslurnar eru lokalar, tí 'fremmandu' fyritøkurnar eru komnar eftir, hvussu umráðandi tað er, at fyritøkurnar eru sosialt gróðursettar í lokalsamfelagnum. Bartal Dulavík sigur, at sjálvandi hevur ein so sterk, lokal samstarvsmentan sínar vansar. Hon hevur lyndi til at verja seg ímóti kreftum uttaneftir, ið royna at fáa fótin fastan í lokalsamfelagnum, serliga um tað er innan fyri øki hjá onkrum av verandi fyritøkum. Sterka lokala mentanin hevur higartil víst seg at vera gott grundarlag fyri menning; kunsturin er at finna eina javnvág, so hon ikki gerst so sterk, at hon steingir íblástur uttaneftir úti og sostatt verður ein *forðing* fyri framhaldandi menning.



# Grannastevna

Jóannes Eidesgaard, tingmaður, skrivar

## Nei til óskerda nýliberalismu!

Við bit og slit og í harðari kapping við eitt ávíst politisk stórmál hevur økismenningin vunnið sær veg inn á politiska pallin. Vit hava fingið ein arbeiðsbólk og ein granskingardepil, sum lýsa, hvat hendir. Tað er bæði rætt og skilagott, at vit fáa lýst teir bygnaðarligu trupulleikar, sum okkara útjaðari hevur. Tað er ein avgjørd forteyt fyri, at vit kunnu taka skilagóðar avgerðir. Hinvegin, so mugu vit eisini gera okkum greitt, at gransking og kanning ikki í sjálvum sær loysir trupulleikan. Til tess krevjast ítøkiligar atgerðir.

Tíðarskeiðið 1880-1930 høvdu vit eina rættiliga sterka miðsavnan til eitt øki, sum í dag hevur fingið tann ivasama heiður at verða kallað eitt útjaðaraøki. Kvinnur og menn í hópatali fluttu til Suðuroynna, tí har vóru vinnumøguleikar av teimum frægu. Krøvini vóru snøgt sagt arbeiði og tak yvir høvdið. Nýggja tíðin við sluppfiskiskapi og fiskaarbeiði var arbeiðskrevjandi, og aðrir arbeiðsmøguleikar vóru í stóran mun ikki at finna í Føroyum.

Tá var tað tímalønta arbeiðið og hýran við sluppini, sum stýrdu miðsavningini, meðan tað í dag er arbeiði av heilt øðrum slag. Umframt vanligt tímalønt arbeiði og handverkaraarbeiði sjálvandi, so er tað í stóran mun meira arbeiði við bókligum førleikakrøvum. Og bólkurin, sum ongantíð ella sjáldan vendir aftur til útjaðaran, eru júst fólk, sum hava nomið sær eina útbúgving og tað serliga hægri útbúgvingar. Krøvini frá hesum fólkum eru meira fjøltáttaði, alt frá bústaðarmøguleikum, barnaansing, góð skúlaviðurskifti, góð frítíðartilboð, ríkt mentunnarlív o.a.

Menningin í samfelagnum vil altíð verða stýrd av tí dominerandi ráki, sum er frami í tíðini. Nú er slagorðið, at allar avgerðir skulu takast eftir marknaðarbúskaparligum treytum. Marknaðurin, t.v.s. vinnan, skal gera av, hvørjar loysnirnar skulu verða, meðan politikkarar skulu seta karmar rundan um vinnuna. Nú er tað illavorðið, um politikkarar hava eina hugsjón um, hvussu búsetingarmynstrið í framtíðarsamfelagnum helst eigur at verða. Nei, nú er eitt nýliberalistiskt rák, sum letur allar hesar spurningar upp í hendurnar á vinnulívinum at gera av, um tað so er okkara egna ella útlendskt vinnulív.

Men hvørjir eru so veruleikarnir í Føroyum á hesum øki? Jú, miðstaðarøkið, t.v.s. Suðurstreymoy og Eysturoyggin eru nýggju vakstrarøkini, meðan restin er útjaðari, nøkur øki meira enn onnur. Vágar eru um at koma við upp í miðstaðarøkið, nú fasta sambandið um sundið skjótt gerst veruleiki. Ætlanir, sum hava verið nevndar um fast samband um Lorvíksfjørð, ger, at vit í framtíðini bert fáa tvey verulig útjaðaraøki, Suðuroynna og Sandoynna.

Og júst hesi bæði øki eru í eini heilt serligari støðu, hvat menning viðvíkur. Vinnuliga menningin er lítil og einstáttað, og fólkatalið er minni í dag enn fyri 50 árum síðani. Tí er ongantíð ov skjótt, at vit politikkarar taka hesa gongd í fullum álvara. Vit kunnu ikki seta kikaran fyri blinda eygað og halda, at aðrir loysa málið fyri okkum, men veruliga taka hetta sum eina politiska avbjóðing. Og trupulleikin er dupultur. Útjaðarin hevur ein trupulleika við ongari tilflyting, meðan miðstaðarøkið hevur ein trupulleika við ov nógvari tilflyting.

Við allari virðing fyri fiskiskapi og fiskaarbeiði, so er eitt samfelag á vandakós, um øll í økinum bert tosa um fisk. Vit mugu hava eina fólkasamanseting, har eisini aðrir fakligir bólkar mynda samfelagið, handverkarar, sjúkrasystrar, pedagogar, skrivstovufólk, løgfrøðingar, búskaparfrøðingar, verkfrøðingar, lærarar av ymiskum slag o.o. Og til tess at náa hesum máli, má ein partur av teimum arbeiðsplássum, sum krevja hesar førleikar onkursvegnað leggjast í útjaðaranum.

Miðsavningin er so inngrógvin í Føroyum, at sjálvt feløg og stovnar, ið einki neyðturviligt samband hava við høvuðsstaðin, halda til í Havn. Skulu vit bróta hesa gongd, so krevst politiskur virkisvilji. Hetta verður ikki broytt uttan svørðslag og nógv níst, men tað er neyðugt, um vit vilja hava eina aðra gongd. Tað er eingin natúrulóg, sum sigur, at øll umsiting skal liggja í Havn.

Men hetta krevur nýhugsan. Sjálvsagt eiga vit at umhugsa at leggja nýggjar umsitingar í útjaðaran, sum eitt nú oljuumsitingina, sum eisini endaði í Havn. Skulu vit flyta umsitingar, sum hava fest røtur í Havn, vil tað sjálvandi gerast truplari, men tó ikki verri enn so, tað ber til. Sjálvandi skal Havnin sum høvuðsstaður hava sína miðfyrisiting, sum hoyrir til, men tað er tó rættiliga nógv umsiting, sum uttan trupulleikar kann liggja uttan fyri Havnina, sum t.d. Vaktar- og Bjargingartænastan, Føroya Jarðarráð, Matrikkulstovan og uttan iva eisini fleiri aðrar, umframt skúlar og tænastur.

Útgerðarhavnin var ein møguleiki, sum politiski meirilutin lat fara aftur við borðinum. Her valdi mann enn einaferð at siga, at tað má vinnan sjálv finna útav. So í staðin fyri at loysa ein veruligan trupulleika, sum bert vit varða av, so lat mann útlendsk oljufeløg taka avgerðina, og trupulleikin er framvegis trupulleiki.

Onkur hevur sagt, at samferðslan er alt avgerandi fyri menningina í útjaðaranum. Hetta er tó ikki heilt rætt, tí um vit lótu Smyril sigla dupult so nógvar túrar, sum hann ger nú, so hevði tað ikki loyst tann trupulleika, sum Suðuroyggin hevur. Hetta skapar ikki beinleiðis arbeiðspláss, men fingu vit hin vegin eina vinnuliga menning og eina dygga tilflyting, so hevði túratalið farið upp, tí nú hevði tørvurin kravt tað.

Eitt annað, sum avgjørt kann hjálpa útjaðaranum, er, at tað gerst lættari fíggjarliga at búgva í t.d. Elduvík og at arbeiða í Havn. Her kundi ein broyting í endurgjaldinum fyri at ferðast til og frá arbeiðsplássinum gjørt ein munandi bata. Vit hava vegirnar, og vit hava bilarnar.

Eitt triðja, sum vit vita er ein ítøkiligur trupulleiki, er, at tað er nógv truplari at fáa fígging til vinnuvirki í útjaðaranum enn í miðstaðarøkinum. Her áttu vit at umhugsa, um tað ber til frá almennari síðu at medvirka til, at hesin ójavni hvarv. Eg haldi søgan um snikkaran í Dali henda morgunin í Útvarpinum talar fyri seg.

Eg eri onga løtu í iva um, at eitt komandi løgtingsval fer at seta útjaðaran á dagsskránna. Politisku flokkarnir noyðast at hava sítt boð upp á, hvat gerast skal. Tá dugir lítið við vøkrum orðingum um, at vit vilja í verki hjálpa útjaðaranum, tí veljarin, serliga úr útjaðaranum, fer at krevja ítøkiligar ætlanir um tiltøk.

# Kommunan letur partapeningin

Í ár verður ein nýggj vinnuframaskipan roynd í finsku kommununi Juuka. Tá fer at bera til hjá ungum fólkum, ið vilja royna seg innan vinnulívið, at søkja kommununa um at fáa lógarkravda partapeningin sum stuðul frá kommununi. Finska partafelagslógin krevur, at partapeningurin er í minsta lagi 50.000 markar, t.e. uml. 60.000-65.000 kr. í okkara peningi.

Juuka kommuna hevur verið fyri afturgongd seinastu 10 árini, og arbeiðsloysið er 23,6% (1998-tøl). Roynt verður av øllum alvi at venda gongdini. Ein partur í hesum er at stuðla uppundir nýggjar vinnufyritøkur. Ahti Puumalainen, fyrisitingarstjóri í Juuka kommunu, sigur, at mong góð vinnuhugskot verða íbirt í Juuka millum ár og dag.

- Í mongum føri hava hugskotsfólkini ikki tann eginpeningin, ið lógin og fíggingarstovnarnir krevja, og tað er spell, um so er, at talan annars er um lívført vinnuvirksemi, sigur finski fyrisitingarstjórin.

Ahti Puumalainen sigur, at kommunan sjálv á ongan hátt verður innblandað í metingina av teimum vinnuætlanum, sum fara at søkja. Tá ið ein umsókn kemur til kommununa, so verður hon send økisskrivstovuni hjá finska Vinnumálastýrinum í Joensuu, og viðgjørd á fíggjardeildini har.

- Meta fíggjarfrøðingarnir í Vinnumálastýrinum, at talan er um eina burðardygga vinnuætlan, so letur Juuka kommuna 50.000 finskar markar í stuðli, og hesin peningur skal so setast í virki sum kravdur partapeningur, sigur Puumalainen, ið undirstrikar, at kommunan heldur ikki verður partaeigari.

Í Juuka kommunu er nakað størri enn Føroyar til víddar, og har búgva umleið 6.900 fólk. Ein lítil helvt av teimum, sum eru í arbeiði, starvast innan tænastuvinnuna, meðan restin býtir seg helvt um helvt millum ávikavist landbúnað/skógarbrúk og ídnað.



*Juuka er heimskent fyri sína framleiðslu av ovnum o.l. burturúr sokallaðum sápusteini. Á ráðhúsinum í Juuka kommunu eru tey spent í um nýggja vinnuframaskipanin ferð at fjøltátta vinnubygnaðin.*

# Kommunur ganga saman

Føroysku kommunurnar eru nógvar so smáar, at tær megna ikki at útinna tær uppgávur, ið teimum eru álagdar, og ikki um at tala tær uppgávur, ið tær væntandi skulu taka uppá seg í framtíðini. Eisini eru málini so fá í tali, at grundarlag er ikki fyri at seta útbúgvið fólk og harvið menna og halda viðlíka neyðuga førleikan í kommununum.

Í staðin vera hesar uppgávur røktar av landsmyndugleikunum ella verða tænasturnar keyptar frá privatum, har tað ber til.

Kommunurnar Fakse og Rønnede eru smáar í donskum høpi við ávikavist 7000 og 12000 íbúgvum. Men tær halda, at ráð eru fyri hesum. Tær hava í felag stovnað eina menningardeild, og herfyri lýstu tær í felag eftir fimm akademiskum starvsfólkum.

- Loysa uppgávur í felag ella fyri hvørja aðra, so verða kommunurnar ikki førar fyri at lúka tey krøv, sum borgararnir seta við góðum rætti, sigur Ib Oustrup, ið hevur verið kommunustjóri í Fakse.

Hendan nýggja eindin fer at skapa eitt umhvørvi fyri útbúnu fólkini, og tað er gott: Størvini verða meiri lokkandi fyri tey og kjansurin fyri at fólkini støðast eisini størri, tí tey bæði fakliga og sosialt verða minni einslig enn tað, sum annars hevur verið vanligt fyri útbúgvið fólk í smáum kommunum.

Ein annar trupulleiki í smáum kommunum er eisini, at talið av fakligum málum er so lítið, og tí fær útbúnað fólki oftast fáa bæði líkt og ólíkt at viðgera, eisini sovorðið, sum strangt tikið ikki er ‘teirra borð’. Avleiðingin er, at førleikin minkar og tískil eisni hugurin at vera. Samstarv millum kommunur um setan av útbúnum starvsfólki kann ætlandi byrgja upp fyri hesum vansum.

Skipanin í Fakse/Rønnedesamstarvinum verður hon, at akademisku starvsfólkini eru sett í báðum kommunum, har tey loysa meiri dagligar uppgávur, men hava so skyldu til at arbeiða eina ávísa tíð fyri menningardeildina í økinum.

*Kelda: DJØF-bladet nr. 22/nov. 2000*

# Gestur verjir PhD-ritgerð



Hvat er tað, sum skapar vinnuligan dynamikk í einum lokalsamfelag? Hettar er spurningurin, ið Gestur Hovgaard hevur sett sær fyri at svara í PhD-ritgerð síni. Svarið er, at tað, sum skapar vinnuligan dynamikk, ikki nýtist at vera tað sama í øllum plássum.

*Gestur Hovgaard, ið starvast á Granskingardeplinum, verður fyrsti føroyski samfelagsfrøðingurin, ið skal verja eina PhD-ritgerð*

Hettar svarið kemur hann fram til við at samanbera vinnulívið í Båtsfjørðinum í Norður-Noregi og Klaksvík, ið bæði er fiskivinnupláss við vinnuligari framgongd; men søgulig og mentannarlig bakstøði í hesum plássum eru fullkomuliga ymisk, og hettar skapar heilt ymiskar fortreytir og púra ymisk vinnulig umhvørvi.

Niðurstøðan er sostatt, at tað ikki finst ein abstraktur sannleiki, sum er galdandi fyri øll pláss, tá ið um vinnuligan dynamikk ræður. Hvørt pláss sær má kenna sínar søguligu røtur og lokalu mentanina fyri at fáa eitt sterkt og burðardygt lokalsamfelag.

Ritgerðin er latin inn til verju á universitetinum í Roskilde, har hon skal verjast í vár. Opponentarnir verða Herman Schmid frá universitetinum í Roskilde, Bob Jessop frá universitetinum í Lancaster, og Ottar Brox frá Norsk Institutt for By- og Regionforskning.

# Oilwind: Nýtøkni grundað á holla siðvenju

Hugtakið Vága-snellan munnu tey flestu helst kenna. Tað er Oilwind í Miðvági, ið ger hana, og tann elektroniska snellan er helst flaggskipið hjá Vága-fyritøkuni. Men Oilwind-fyritøkan fæst við so mangt, t.d. framkomna útgerð til alivinnuna og trolspøl. Fyritøkan byrjaði í slupptíðini sum vanlig smiðja, ið umvældi skip. Síðani er so mangt hent, og í dag stjórnar 4. ættarliðið í familjuni einum fjølbroyttum virksemi, ið verður gjørt av umleið 45 starvsfólkum. Talan er bæði um framleiðslu og tænastur.

- Arbeiðsfólkið flexar millum tænastu- og framleiðslupartin. Sjálvt um tað hevur sínar vansar, so er hettar avgjørt styrkin hjá føroyingum, sigur Jákup Joensen.

Á Oilwind er stutt frá tí hægsta til tann lægsta. Í verki vil hettar m.a. siga, at starvsfólkið í stóran mun í eru uppií, tá ið tilboð verða givin.

- Somu fólkini, sum hava verið við í forhondsarbeiðnum, skulu sjálvi útinna tað í verki, og tí hevur tað ofta víst seg, at hóast ein kanska av fyrstan tíð hevur aftrað seg við at geva tilboð, so hevur úrslitið verið betur enn væntað, tá ið avtornar, sigur Jákup.

Eins og Vágoyggin yvirhøvir, so hevur Oilwind kent sviðan av kreppuni, tá ið flakavirkið varð stongt. Jákup Joensen vísir á, hvussu stórt avleidda virksemið av einum slíkum virki í oynni er:

- Skip og bátar hildu uppat at koma her. Tað hevði við sær, at Oilwind ikki sum áður hevði stórt tal av skipum at arbeiða umborð. Sjálvur hevði eg saman við konuni ein handil, ið seldi klæðir o.a. til tey, sum arbeiddu m.a. á flakavirkinum, men tað var sera soltið at reka handil i hesum tíðarskeiðnum, greiðir Oilwind-stjórin frá.

Jákup Joensen framheldur, at tað gjørdi munin, at ein bygdarmaður gjørdist stjóri á Fiskavirking. Meinhard Jacobsen fekk gongd á aftur virkið í



Miðvági, og tað hevur havt ómetaligan týdning. Í dag bjóðar virkið í fleiri førum upp á heilar lastir, og tað gevur skipunum høvi til at biðja um neyðugar tænastur frá Oilwind.

Á Oilwind gleða tey seg - eins og Vágafólk yvirhøvir - til fasta sambandið um Vestmannasund. Eftir at uppboðssølan er komin inni á Toftum, so er nógv mesta tænastuvirksemið til skip konsentrerað harinni. Men ferjusambandið ger, at fyritøkurnar í vinnugreinini als ikki kappast á jøvnum føti.

- Skipini koma inn og fara útaftur sama dag, og tí ræður um at vera á staðnum til tíðina, skalt tú veita eina nøktandi tænastu. Tað er trupult í dag, tí sundið hevur við sær ein mundi meirkostnað, ið virkið má taka upp á seg, sigur Jákup.

Skalt tú senda lutir við almennu flutningstænastunum, so skal alt um Havnina, og hettar heldur Jákup er ein fløskuhálsir. Hann heldur, at Bygdaleiðir, Postverk Føroya og Strandferðslan kundu verið meiri samskipað og harvið effektivari.

Føroysk virki brúka ikki stórvegis av peningi til tað gransking og menning, sum annars verður alt meiri týdningarmikil, skalt tú standa teg í altjóða kapping. Oilwind er eitt av undantøkunum. Í 1980-unum vóru brúktar fleiri milliónir brúktar til vørumenning, og fram til 1992 var tað alt eginfíggjað. Í dag nýtir Oilwind um 300-400.000 kr. árliga yvir raksturin til gransking og menning.

Spurningurin er so, um og í hvønn mun tað almenna eigur at hava vinnuframaskipanir, ið stuðla gransking og menning. Jákup heldur, at tað er umráðandi, men at tað eigur at vera miðvíst og skipað.

- Menningin av nýggjastu snelluni er fíggjað við 30% stuðli frá Grunninum til Ídnaðarfremjandi Endamál. Menningarstovan er nálareygað, og fyri okkara viðkomandi hevur hon virkað væl, hóast ein kundi ynskt, at skipanin var eitt sindur smidligari, sigur Jákup Joensen.

Føroyskar fyritøkur eru vorðnar meiri professionellar síðani kreppuna, og Jákup Joensen heldur, at tann útskeldaði Føroya Banka-stjórin Jørn Astrup eigur sín leiklut í hesum.

- Hann hevur fingið føroyskar fyritøkur at skilja, at tað eigur ikki at vera nóg mikið bert at hóra undan. Tú mást skapa eitt yvirskot, sum konsoliderar og mennir fyritøkuna, so hon stendur seg í kapping og skiftandi tíðum.

Ein partur av professionaliseringini kann vera at fáa nevndarlimir uttaneftir.

Nevndin í eini familjufyritøku er oftast mannað við eigarunum ella næstringum, og tað kann tí vera eitt sindur trupult at fáa nýggjan íblástur. Sjálvur sigur stjórin á Oilwind, at um tað kann gagna fyritøkuni, so er hann er opin fyri at fáa nevndarlimir uttaneftir, eitt krav sum t.d. Framtaksgrunnurin vanliga setur sum treyt fyri fígging.

Tann framburður, ið skal skapast í Vágoynni, mugu vágafólk sjálvi skapa. T.d. kann nógv fáast burturúr Vágoynni sum landbúnaðarøki, um treytirnar fyri almennu stuðli vórðu herdar. Á trivnaðarøkinum liggur nógv á láni, skal tunnilin ikki hava við sær, at fólk flyta av oynni, heldur Jákup:

- Á ítróttarøkinum eru vit væl fyri, men útboðini á kvøldskúlaøkinum eiga at vera nógv fleiri. Eisini er saknur í einum vardum verkstaði. Vit eiga avgjørt at miða eftir fáa ein miðnámsskúla her vesturi, sjálvt um tað ikki verður í bræði: Umframt at hettar hevði útsett stórbýar-upphaldið, so hevði ungdómurin varðveitt sambandið við heimliga umhvørvið í trý týðandi ár eftir fólkaskúlan, og tað hevði óivað økt sannlíkið fyri, at tey koma aftur hendan vegin at búgva, sigur Jákup Joensen hevur góðar vónir til framtíðarmenningina í Vágoynni.

Útgevari:
**Granskingarverkætlanin fyri Økismenning**
Jústagøta 1
**Postadressa:**
Postboks 159
700 Klaksvík
Tlf. 457744 & Fax 457743
Suðuroy: Tlf. 37 44 77
E-postur: region@region.fo
Heimasíða: www.region.fo
**Ábyrgd:** Dennis Holm og Bjarni Motrensen
**Umbróting:**
Miðil, Klaksvík
**Prent:**
Hestprent